# Posta Stamps

Føroyar

Nr. 40

Apríl 2019




- Fyri faðirleys
- Grísahald í Føroyum
- Elinborg Lützen 100 ár
- Jóhanna og Westward Ho 135 ár
- Messuaklar

Posta
FAROE ISLANDS







Royndarprent

# Barnagrunnurin "Fyri Faðirleys"

**Annar heimsbardagi og Føroyar**
Við týsku hersetingini av Danmark 9. apríl 1940 varð sambandið kvett millum ríkispartarnar. 13. apríl 1940 hersettu bretar Føroyar við givnum lyfti um, at oyggjarnar vórðu latnar Danmark aftur, tá kríggið var av – og at politiska støða Føroya tá skuldi verða "status quo" ella óbroytt í mun til tíðina fyri hersetingina.

Krígsárini vóru Føroyar við sínum 27.000 íbúgvum stýrdar av amtmanninum Aage Hilbert og Løgtinginum í felag, har ein bráðfeingisstýrisskipan varð tikin í brúk í 1940 – hon stóð við til í 1948. Avbjóðingarnar vóru ovurhonds stórar í allar mátar – politiskt, búskaparliga og mentanarliga, - m.a. vóru áleið 8.000 bretskir hermenn í Føroyum, tá teir vóru flestir.

**Skipini máttu sigla**
Fremsti vinnuvegur føroyinga var fiskiskapur – tá sum nú – og skjótt máttu vit føroyingar ásanna gamla orðatakið: "Ringt er at hava hjallin á sjónum".

Hóast nakað varð fiskað krígsárini, so var mestur dentur lagdur á at keypa og føra ísfiskalastir úr Íslandi á marknaðin í Bretlandi. Hartil kravdist heldur ikki so nógv manning, tá vandasjógvur skuldi siglast, og um illa vildi við.

Sum kríggið nærkaðist Føroyum fingu føroyingar eisini ólukkurnar at kenna. Skipini sigldu vandasjógv millum minur í hópatali, luftálop frá týskum flogførum, torpedoir frá sníkjandi kavbátum og ikki minst sløktar vitar. Hvørt verri enn annað. Hóast hetta, so var túratalið til Bretlands hjá føroysku skipunum krígsárini seinni gjørt upp til 2.354 túrar við 151.973 tonsum av ísfiski. 4000 mans luttóku í hesari vandasigling við 187 skipum.

**Flaggspurningurin:**
**"Dannebrog" skift út við "Merkið"**
Sjálvsagt var tørvur á, at føroysk skip høvdu annað flagg enn danska "Dannebrog" á stong í teirra ørindum í Bretlandi, tá Týskland jú hevði hersett Danmark. Soleiðis


# BÚGVIN

1. ÁRG. | 1. OKTOBER 1941 | NR. 19

FYRI FAÐIRLEYS

**Skaldskapur og politikkur.**

Her í blaðnum var á sinni til ummælis ein bók, Nordens stämma, sum felagið Nordens Frihed hevur fyrireikað, og sum kom út í Stockholmi seinasta vetur.

Bókin er eitt felagssavn, eitt úrval av bestu yrkingum úr øllum norðanlondunum, líka frá fornari tíð til okkara dagar, har føðilandskærleiki, tjóðskaparandi og felags norrøna rørslan verða sett í hásætið. Í

Hetta litla merkið ið omanfyri stendur

*Blaðið Búgvin, sum savnaði og kunnaði útisetar í Danmark um viðkomandi tíðindi úr Føroyum*

gjørdist tað Bretland, ið "gav" føroyingum "Merkið", tað føroyska flaggið. "Merkið" var viðurkent 25. apríl 1940, hóast amtmaðurin Aage Hilbert stríddist ímóti føroyskum "súmbolum" m.a. eisini føroyskum frímerkjum og vísti eitt nú til "status quo" lyftið breta i flagspurninginum.

**Skip hvørva við mann og mús**

Sluppin "Aldan" fórst seinast í juli 1940, ávegis til Aberdeen – tað fyrsta av 16 skipum, ið somuleiðis kravdu mannskaða krígsárini; harumframt fórust 22 onnur skip, har øll manningin varð bjargað. Ein bygd sum Vestmanna misti til dømis 5 av 7 skipum hesi árini.

Mannfallið hesi árini 1939-1945 av krígsávum var 210. - 150 við føroyskum skipum; nógvir við útlendskum skipum - og so einstakir aðrir á landi. Einkjurnar í stórum tali vóru hetjurnar við millum 240 - 300 faðirleysum børnum – (keldur eru ymiskar á máli viðvíkjandi hesum tali) - har eingin almennur sosialur trygdarkassi tók við – tað eru hesi, sum føroyingar minnast og ofta taka til.

Í hagtølum vóru Føroyar millum tær tjóðir, ið mistu flest fólk í mun til fólkatalið. Tað verður sagt - møguliga av røttum, at einans Pólland og Nýsæland mistu fleiri fólk lutfalsliga. Síðani 1. november 1949 (Allahalgannadag) hevur á hvørjum ári verið hildið minningarhald í Føroyum fyri sjólætnum. Dagurin var ásettur av Føroya Løgtingi.

**Føroyingar í útlegd - í Danmark**

Í Danmark vóru áleið 3000 føroyingar staddir, tá Danmark varð hersett 9. apríl 1940. Teir sluppu ongan veg heim. "Føringafelagið" í Keypmannahavn gjørdist skjótt teirra savningarstað, og tann virkisfýsni Sigurð Joensen var millum teirra, ið tóku stig til at geva út blaðið "Búgvin" (Búgvin er stakkur norðanvert Eysturoynna). Endamálið við Búgvanum var at savna øll tíðindi úr Føroyum, ið oftast mundu koma við posti umvegis Svøríki, ið varðveitti støðuna sum

*"Merkið". Myndina gjørdi Janus Kamban. Prent J. Jørgensen & Co. Bogtrykkeri, Keypmannahavn. 1. prent í september 1941 taldi 2171 ørk á 25 merki. 2. prent kom í oktober 1943 og taldi 2125 ørk á 25 merki. Tey vóru seld fyri 2 oyra/merki. "Búmerkið" hjá J. Jørgensen & Co. sæst bert á seinna prenti. Ein annar munur er, at meðan límið er myrkt og sæst sera væl á fyrra prentinum, so er límið á tí seinna av slagnum "dekstrin", og sæst ikki so væl.*




*"Móðir og barn". Myndina gjørdi Janus Kamban. Prent J. Jørgensen & Co. Keypmannahavn í mars 1945. Prentað vóru gott 4.000 ørk á 25 merki og vóru tey seld fyrstu ferð á páskum í Føroyingafelagnum. Prísurin var 2 oyru merki. Nýtta límið var av slagnum "dekstrin". Serliga hetta seinna merkið hevur verið nógv sæð brúkt í Føroyum. Tað sigst, at Barnahjálpargrunnurin fekk 80.000 eintøk at selja.*




uttanveltað land øll krígsárini. Hetta vóru nærum altíð "gomul tíðindi", men á henda hátt frættu útisetarnir hesi ófrættaboðini, um hvørji skip vóru gingin burtur, hvussu nógvir mans vóru farnir við hvørjum skipi; og ofta eisini hvørjir teir vóru. Búgvin nevnir so at siga øll skipini sum fórust.

**Barnagrunnurin "Fyri Faðirleys"**

Búgvin skrivar 1. oktober 1941 á forsíðuni: *"Hetta lítla merkið, ið omanfyri stendur, skal hjálpa føroyskum smábørnum, ið kríggið hevur gjørt faðirleys. Vit sóu í seinasta Búgva hvussu mangir fórust í fjør, og tað er fryktandi fyri, at uppaftur fleiri eru burturgingnir í ár. – Táið vit seta merkið á tey brøv vit senda okkara millum, og serliga á tey vit senda til Føroya, tá vísa vit okkara vilja til at styðja og gleða smáar, illa staddar landsmenn; vit burturstøddu eru so stórur partur av Føroya fólki, at tað krevst at eisini vit eftir førimuni arbeiða fyri fólki okkara; børnini eru Føroya framtíð. – Janus Kamban hevur teknað myndina. Merkið, ið er flagg okkara, vita vit at øll hava tokka til og gleðiliga seta á brøv síni. – Vit undirritaðu svara fyri, at tað ið inn kemur, fer til børnini og avgreiðsluútløgur verða ongar.*

*Malla Samuelsen, Sigrið Mouritsen, Margit Øssurson, Astrið á Rógvi, Astrið Klein og Hanna Vang.*

*Merkið verður at fáa har Føroyingar koma saman og hjá omanfyrinevndu konum. Nú vóna vit, at tað verður væl ímóti tí tikið. Tað er longu tíð at fara at hugsa um jólabrøvini til Føroya, gloymið so ikki at seta merkið á tey. Fyrsta upplag er í 50.000 eint. Tey áttu at verðið seld í ár. Prísurin er 2 oyru. Fyri 50 oyru fáa tygum eitt ark við 25 merkjum.*
*Hanna Vang, avgreiðslukona, Venedigvej 8,2".*

Í tí næsta Búgvanum varð kunngjørt, hvar í Danmark merkini fingust umframt frá áður nevndu kvinnum, hvørs felagsnevnari annars var, at tær stóðu fyri sunnudagsskúlanum hjá føroyskum børnum í Keypmannahavn:




*Bræv úr Danmark til Føroya, latið upp av týska sensurinum og brævklipp av merkjunum Fyri faðirleys.*
*Ogn: Álvur Danielsen*

Í Jútlandi fekst merkið hjá Kammu Ingvartsen, Aabyhøj, á Fjóni hjá Gudmund Bruun, prósti, Hesselager og í Marstal hjá Fischer Heinesen. Fischer og Olaf Petersen vóru grannskoðarar hjá grunninum. Eisini fingust merkini við at gjalda pening inn á girokontonummar 30720, sæst at lesa í Búgvanum.

**Barnahjálpargrunnurin í Føroyum tekur við**

Í Danmark bórust tíðindini úr Føroyum um, at "Barnahjálpargrunnurin" var stovnsettur 4. apríl 1942. Tað var nevniliga Petur Háberg sum fekk hugskotið, tá ið hann frætti tíðindi um grunnin Fyri Faðirleys í einari "Radiohilsen" í donskum útvarpi. Og í juli 1944 skrivar Búgvin, at Barnahjálpargrunnurin í Føroyum eins og Barnagrunnurin Fyri Faðirleys í Danmark hevði givið út eitt brævamerki. Endamálið hjá báðum grunnunum var hitt sama: Ágóðin av merkjasøluni og inntøkur annars (gávur) skuldu verða nýttar til illa stødd børn í Føroyum.

Tær, sum høvdu sett á stovn Barnagrunnin Fyri Faðirleys, hugsaðu um Barnahjálpargrunnin í Føroyum, nú kríggið leið móti endanum. Sum Hanna við Høgadalsá (áður Vang) segði í samrøðu við undirritaða í 2002: "Bæði roknskapur varð førdur, og gerðabók skrivað. Vit bjóðaðu ikki til at býta nakað út í Føroyum úr Danmark".

Sjálv var Hanna við Høgadalsá (1917 – 2004) kassameistari og hon mintist, at hon og familjan tóku fyrsta skipið til Føroya, nevniliga ferðamannaskipið SS Aarhus, sum kom á Havnina 4. august í 1945. Hanna segði, at hon tók tá alt við sær, bæði pening og brævamerkir – ein stóran brævbjálva. Heimkomin fór hon beinleiðis at vitja Petur Háberg, sum umboðaði Barnahjálpargrunnin. Skjøl hjá Barnahjálpargrunninum vísa, at upphæddin frá Fyri Faðirleys var 5.205,74 Kr. (Svarandi til áleið eina ársløn hjá einum arbeiðsmanni í 1945). Tað kann viðmerkjast, at nevnda gerðabók og roknskapur hjá Barnagrunninum Fyri Faðirleys tíverri ikki eru tøk. Partvís sæst tó roknskapurin í Búgvanum 1941 – 1946.



Mynd: Jens Kristian Vang

*Janus Kamban (1913-2009) gjørdi myndirnar ókeypis til tey bæði merkini.*

*Í samrøðu við Álv Danielsen segði Janus um fyrra merkið: "Jú, tað vóru tíðindi úr Føroyum. Vit fylgdu væl við. - Flaggið fekk dópin, tá Ísland helt 1000 ára hátíðarhaldið í 1930, og Stauning segði: "Tag så den klud ned" og peikaði á føroyska flaggið. Soleiðis var tað gleðin um viðurkenningina av Merkinum, sum gav Janusi íblástur til merkið.*

Á smáarkinum síggjast "Merkið" og "Móðir og barn" – tey bæði merkini hjá grunninum Fyri Faðirleys. Eisini sæst sluppin "Aldan" úr Vági, sum fórst við 6 monnum.

*Álvur Danielsen*

Umframt nevndu keldur í tekstinum, so hava serliga hesar verið nýttar:

- Víkingasynir, Jákup Joensen,1947.
- Kissa – við áir og vøtn, Sprotin, 1996. (Kissa var kassameistari í "Barnahjálpargrunninum" í nógv ár.)
- FF blaðið Nr. 353 frá 27.10.2005.
- Skjøl hjá Barnahjálpargrunninum á Landsskjalasavninum.
- Samrøða við Áslu Poulsen, Tórshavn í 2003.

# Merkið 100 ár

Hendan frímerkjaútgávan heiðrar eisini "Merkið", nú hundrað ár eru liðin síðani tað varð borið alment fram á fysta sinni í Nordmansdalen við Fredensborg í Danmark. Merkið varð teknað av táverandi stud.jur. Jens Olivur Lisberg úr Fámjin saman við Janusi Øssursyni og Paula Dahl.

Longu tíðliga í 1920-árunum fóru fólk at flagga við Merkinum. Hetta vant rættiliga upp á seg eftir 1930, men loyvt var tað ikki, og eitt flaggstríð tók seg upp í Løgtinginum og millum føroyingar og donsku myndugleikarnar.

Tað vóru serliga sjómenninir, ið førdu hetta stríð. Longu 9. apríl 1940, sama dag sum Danmark varð hersett av Týsklandi undir seinna heimsbardaga, fór sluppin Eysturoyggin at flagga við Merkinum. Hetta tí at danska flaggið ikki kundi brúkast, meðan Danmark var hersett av Týsklandi.

25. apríl 1940 viðurkendi bretska hersetingarvaldið "Merkið" sum tjóðarmerki føroyinga.



*Merkið. Mynd: Faroephoto*

Síðani 1947 hevur 25. apríl verið hildin sum flaggdagur føroyinga.

**Flaggsigling 2019**
Sjey gomul føroysk træseglskip, íroknað Jóhanna TG 326 og Westward Ho TN54 heiðra "Merkið" við tiltakinum Flaggsigling 2019. Siglt verður úr Føroyum 16. mai 2019, til Odense, har føroyski flotin, frá 23. til 26. mai 2019, fer at luttaka í Odense Havne-kulturfestival.

Frá Odense verður siglt til Aarhus, 27.-28. mai. Flotin vitjar Helsingør 29. mai og fer so víðari til Keypmannahavnar. Lagt verður at kei við Norðuratlants-
bryggjuna tann 30. mai 2019.

2. juni 2019 verður hátíðarhildið, at "Merkið" fyllir 100 ár. Fyrst fara skipsmanningar saman við føroyingum í Keypmannahavn í skrúðgongu frá Norðuratlantsbryggjuni til Regensen, har Merkið fyri fyrstu ferð varð havt á víðum lofti í mai 1919. Tað var frá vind -eyganum í kamar nr. 16 á gongd 7.

Regensen er eitt gamalt kollegium frá 1623 fyri lesandi við Københavns Universitet og Danmarks Tekniske Universitet. Tað stendur tætt við Rundatorn í Keypmannahavn.

Eitt lítið minningarhald verður har, og eitt føroyskt kór fer at syngja.

Síðani verður farið til gudstænastu í Holm-ens Kirkju. Haðani verður farið til Nord-mandsdalen.

Tað var har, at Kjartan Mohr tann 2. juni 1919 gekk á odda við Merkinum, tá ið tað fyri fyrstu ferð alment varð sýnt fram.

Meiri kunning um flaggsiglingina fæst á:
https://www.facebook.com/flaggsigling2019







Royndarprent

**Postgjaldsmerki útgivin í samband við frímerkjaframsýningina í Wuhan í Kina 11.-17. juni 2019**

# Grísahald í Føroyum

Eg minnist væl tann dagin, tá eg fyri fyrstu ferð sá ein livandi grís.

Tað var seinast í sekstiárunum – eg var, saman við vinmonnum á ferð yvir traðirnar millum Hoyvíksvegin og ovara partin av R. C. Effersøesgøtu, ávegis til Svimjihylin í Gundadali. Tá vit fóru framvið einasta rættiliga bóndagarðinum í Havn, sum av órannsakiligum orsøkum kallaðist "Mexiko", sóu vit eitt undarligt djór standa uttanfyri eitt av húsunum.

Tá vit komu nærri, kundu vit bilsnir staðfesta, at tað var ein grísur – hvítur við svørtum blettum – og hann var merkiliga meinlíkur sparigrísinum har heima á hillini.

Tað vakti sjálvandi ans hjá okkum 7 – 8 ára gomlu óvitum, at síggja hetta margháttliga djórið standa sprellivandi framman fyri okkum – og har fullu helst nøkur óvandalig orð um útsjóndina.

Tað er tó ikki so løgið, at vit gjørdust bilsnir av sjónini – livandi grísar eru ikki akkurát vanligir í Føroyum.

Frá fornfrøðiligum útgrevstri, t.d. á Junkarinsfløtti á Sandi, koma so nógvar grísaknotur fyri í køstinum, at fornfrøðingar staðfesta, at har hevur verið talan um fornt grísahald. Hettar er galdandi fyri elstu løgini frá 800 og 900 talinum og upp gjøgnum ovastu løgini frá 1300 talinum, har talið av grísaknotum so líðandi minkar burtur.

Staðarnøvn runt íkring geva eina ábending um fornt grísahald, serliga á sunnaru og vestaru oyggjunum.

At grísahaldið fánar burtur, er tekin um eina natúrliga tillaging av landbúnaðinum sum umhvørvið og landslagið ásetti.

Í tíðini eftir trúbótina, tykist sum føroyingar yvirhøvur eru givnir at halda grís. Í sínari lýsing av Føroyum frá 1592, sigur norski presturin og søgumaðurin, Peder Claussøn Friis, at tað ikki eru nógvir grísar í Føroyum. Orsøkin tykist vera, at grísarnir fóru illa við jørðini.

Tað finst ein skemtilig søga frá 1844, tá táverandi danski krúnprinsurin, seinni Fríðrikur 7. kongur, vitjaði í Føroyum. Krúnprins-



*Tekning: Martin Mörck*

urin kom upp við fregattini Gefion, og við sær høvdu teir nakrar livandi grísar til feskan proviant.

Á Eiði gav krúnprinsurin bóndanum Poul Joensen teir grísarnir, ið eftir vóru. Bóndin tók sjálvandi glaður við gávuni og setti grísarnar upp á Eiðiskoll, at fita teir upp til jóla. Men bóndin hevði ikki hugsað um, at har er bratt oman av Kollinum – og at grísarnir ikki vóru seyðir.

Ein fyri og annar eftir, duttu grísarnir oman – og bóndin fekk ikki skinku á borðið tey jólini.

Hóast fólk upp gjøgnum tíðina hava hildið grísar runt íkring, er ikki talan um stórvegis hald. Ikki fyrr enn undir seinna heimsbardaga, vórðu grísar aftur hildnir í størri tali.

Orsakað av áhaldandi flog- og kavbátaálopum á farmaskip og skipafylgi í Atlantshavi, avgjørdi bretska hernaðarvaldið at byggja flogvøllin í Vágum. Hetta gjørdi at arbeiðshermenn og starvsfólk annars í stórum tali vórðu sett á oynna.

Bretar vilja treyðir vera roykta fleskið, pylsur og annað grísakjøt fyri uttan – so teir løgdu stutt og greitt ein grísagarð í Miðvági. Har var pláss fyri uml. 100 grísum í garðinum, sum vórðu gøddir og flettir til matnað.

Í áttatiárunum varð grísagarður í Froðba, men orsakað av kapping frá bíligari innfluttum svínakjøti, miseydnaðist royndin.

*Anker Eli Petersen*







Royndarprent

# Elinborg Lützen 100 ár

26. juli 2019 eru hundrað ár liðin, síðani grafikarin og myndlistakvinnan Elinborg Lützen varð borin í heim í Klaksvík.

Elinborg Lützen varð viðurkend fyri síni framúrskarandi listarligu verk, og í 1978 var hon fyrsta føroyska kvinna, sum fekk heiðursgávu Føroya Løgtings, og í 1980 fekk hon Barnaheiðursløn Tórshavnar Býráðs fyri sínar einastandandi myndprýðingar av barnabókum – svart-hvítar tusjtekningar og linoliumsskurðir.

Hundraðáradagurin verður hildin á ymsan hátt. Í Klaksvík, heimbygdini, verður ein nýggj standmynd av Elinborg Lützen avdúkað tann 24. september 2019. Hetta er fyrsta standmynd av einari navngivnari føroyskari kvinnu. Hans Pauli Olsen, myndhøggari, hevur gjørt standmyndina. Sama dag letur upp ein framsýning við hennara verkum í Klaksvík.

Posta heldur hundraðáradagin við eini serligari frímerkjaútgávu. Myndevnið á frímerkinum er andlitsmynd av Elinborg Lützen gjørd úr leiri. (Partur av standmyndini). Frímerkið verður givið út tann 23. september 2019, dagin fyri at standmyndin verður avdúkað.

**Um Elinborg Lützen**
**(26. juli 1919 – 22. november 1995)**
Elinborg hoyrir til tað fyrsta ættarliðið av føroyskum yrkismyndlistafólkum. Í 1937 flutti hon til Keypmannahavnar at útbúgva seg á *Tegne- og Kunstindustriskolen for kvinder* og tá annar heimsbardagi brast á, varð hon verandi í Danmark, tí nú bar ikki til at ferðast landanna millum.

Júst hesin skilnaðurin frá Føroyum hevði stóra ávirkan á Elinborg og hini listafólkini, sum eins og hon, ikki sluppu aftur til Føroya orsakað av krígnum. Tí tað var nevniliga í Keypmannahavn undir øðrum heimsbardaga, at tað fyri fyrstu ferð kyknaði eitt



*Linoliumsskurður eftir Elinborg Lützen.*

listarligt umhvørvi rundan um føroyska myndlist. So skjótt sum kríggið var av, fóru øll við sama skipi aftur til Føroya, saman við øðrum listaáhugaðum føroyingum, ið høvdu stovnað *Færøernes Kunstforening* í Danmark undir krígnum.

Hesar serligu umstøður við útlegd og heimferð, gjørdust avgerandi fyri listarliga umhvøvið, sum beint eftir kríggið kom í lag innan myndlistina í Føroyum. Tað var hesin felagsskapur, sum gjørdi at Listasavn Føroya, sum lat upp í 1970, gjørdist veruleiki.

Elinborg var í nøkur ár gift við málaranum Mikines, fyrsta føroyska yrkismyndlistafólkinum, og sum ofta verður mettur sum faðir føroysku málningalistina. Elinborg Lützen var tann fyrsti – og leingi eisni tann einasti – grafikarin í Føroyum. Myndprýðingarnar av eini langari røð av føroyskum barnabókum, hava allarhelst gjørt hana til tað føroyska listafólkið, sum fyrst festi seg í hugan hjá yngra ættarliðnum. Teir týðuligu linoliumskurðirnir í svørt-hvítum siga frá hugnaligum bygdaløgum og gerandislívi, men eisini frá óhugnaligum og ræðandi jatnum, gívrum og um grýluna við teimum fjøruti hølunum, ið kemur oman frá gørðum, við skølm í hendi og bjølg á baki og kemur eftir børnum, sum gráta eftir kjøti í føstu.

Myrkrið hjá Elinborg er fult av loynidómum og er nógv trøllsligar enn skøltarnir, jatnirnar og kellingarnar, sum man hóast alt sær og veit hvar man hevur í myndunum. Svarti liturin hjá Elinborg er ikki bara ein svartur flati, men eitt dapurt myrkur fult av ímyndum og misfostrum úr hugans heimi. Gomlu ævintýrini og skjøldrini eru sterkar og fangandi frásagnir, onkuntíð andstyggiligar, onkuntíð vakrar og skaldsligar og við myndprýðingunum hjá Elinborg fær ríka fólkamentanin eitt eyka huglag og dýpd.

Tilverunnar stóru mótsetningar millum lív og deyða, góðsku og óndskap, vísdóm og dáragerð setast týðuliga upp hvørt móti øðrum, og leggja dent á kjarnan í frásagnunum, sum hava fingið ein føroyskan skurð, sjálvt um innihaldið, formurin og moralurin í ævintýrunum eru almenniskjalig. Og hetta eyðkennir ein stóran part av verkunum hjá Elinborg: náttúra og bygdalag skapa eitt eyðkent føroyskt huglag, sum møguliga er fremmant, men sum eisini er alment galdandi og sum í ymiskum frábrigdum er evropisk felagsogn.

Men verkini hjá Elinborg eru meira enn bert lætt atkomilig hjá børnum og vaksnum í og uttanfyri Føroyar. Tey eru eisini sermerkt, løgin og smá ævintýr í sjálvum sær. Undarliga trøllsligir, lúnskir og vakrir skapningar settir inn í eitt náttúrligt umhvørvi, - eins og er hetta heilt vanligt í Føroyum – sum tað í stóran mun eisini er. Vit føroyingar liva við náttúruni rundan um okkum sum eina sjálvsagda rammu um okkara lív og levnað. Frásagnirnar, søgurnar, hugflogið og skaldskapurin eru somuleiðis ein náttúrligur partur av okkara lyndi og samleika.

Elinborg var sera lítilátin. Hon var við í fleiri framsýningum bæði í Føroyum og uttanlands, men vildi ongantíð sýna fram fyri seg sjálva. Elinborg Lützen verður ofta rópt "tann svart-hvíti meistarin", hennara linoliumsskurðir eru eitt sermerkt og áhugavert íkast til listina bæði í og uttanfyri Føroyar.

*Heimild: Løgmannskrivstovan*



*Brot úr linoliumsskurði eftir Elinborg Lützen*



*Elinborg Lützen til arbeiðis*



Royndarprent




# Jóhanna TG 326 & Westward Ho 135 ár

**Slupptíðin**

Slupptíðin er eitt felagsheiti fyri tíðina frá 1872 til Seinna Heimsbardaga, tá føroyska samfelagið mentist frá feudala og miðaldarkenda bóndasamfelagnum til nútímans fiskivinnutjóð.

**Avtøka av einahandli og bátsbandi**

Eftir at kongaligi einahandilin varð avtikin í 1856 og sokallaða bátsbandið avtikið í 1865, kundu føroyingar keypa og byggja skip til havfiskiskap – og manna skipini. Einahandilin forðaði føroyingum í at reka sjálvstøðugt útflutningsvirksemi – og var yvirhøvur ein forðing fyri menning og nýhugsan.

Bátsbandið var ein miðaldarlig skipan, sum álegði ognarmonnum at hava stórar bátar tøkar – og álegði ognarleysum at manna hesar bátarnar. Stór ónøgd stóðst av hesi feudalu skipan í nítjandu øld, og tað elvdi ofta til ósemju, av tí at menn ikki sjálvir kundu avgerða, um teir vildu fara til útróðurs. Tá einahandilin var lagdur niður og bátsbandið avtikið, kundu føroyingar sjálvir avgera um teir vildu reka vinnuvirksemi ella gerast fulltíðar sjómenn.

**FOX – slupptíðin byrjar**

Fiskimenn í Hetlandi, sum ikki vórðu tarnaðir av somu fyrisitingarligu forðingum sum føroyingar, róku frá uml. 1855 til 1865 stórfiskiskap á føroysku grunnunum. Skipini teir nýttu vóru sokallaðar "Faroe smacks" - smáar tvímastraðar sluppir. Mangir føroyingar sigldu við hetlendsku skipunum og fingu hollan kunnleika um skipsfiskiskap á opnum havi.

Í 1872, tá forðingarnar fyri føroyskum skipsfiskiskapi vóru avtiknar, keyptu "Trappubrøðurnir" í Havn einmastraðu sluppina FOX úr Bretlandi. Hetta verður mett sum byrjanin til slupptíðina. Brátt komu aðrar sluppir til landið, men ikki fyrr enn um aldamótið



*Jóhanna TG 326. Mynd: Eileen Sandá*

kann man siga, at ein munagóð fiskivinna var byrjað í Føroyum.

Sluppirnar fiskaðu á føroysku grunnunum, heilt suður ímóti Rock All – og seinni, fyri mesta partin undir Íslandi. Vanliga lógu sluppirnar um veturin, men í februar/mars løgdu tær út á fyrsta túrin oftast á suðurlandinum í Íslandi. Skipini komu vanliga heim í mai – og manningin fekk eina viku ella tvær heima hjá familjuni, men løgdu so út aftur og komu ikki aftur fyrr enn seint í september. Seinna túrin varð oftast fiskað á eystur og norðurlandinum.

**Trong kor**

Lívið umborð á sluppunum var hart. Fiskað varð við snøri og vaðbeini, og lønin hjá einstaklinginum var treytað av hvussu væl hann fiskaði. Hesin fiskiháttur kravdi eina rímuliga stóra manning og umstøðurnar umborð vóru trongar. Sagt verður enntá frá sluppum, ið høvdu fleiri menn enn koyggjur, – og tað førdi við sær, at menn frá ymsum skipsvaktum máttu skiftast um koyggjuna. Ongin ivi er um, at stóra tuberklasóttin, ið herjaði í Føroyum fyri og eftir aldamótið, fyri stóran part var orsakað av trongu korunum umborð á sluppunum.

**Deyðssiglarar og motorskip**

Fyrstu føroysku sluppirnar vóru sokallaðir deyðssiglarar, t.v.s. seglskip uttan motor. Hetta var sjálvandi ikki vandaleyst – mangt skipsbrot kom fyri í slupptíðini, og tað var ikki sjáldan, at skip høvdu ilt við at vinna upp land, orsakað av veðri og vindi. Uml. 1925 fingu mangar av sluppunum motor ísettan og stýrihús. Tað hjálpti upp á rakstur og trygd, men motorarnir vóru ofta veikir og máttu stuðlast við seglunum.

**Krígssigling**

Undir øðrum heimsbardaga virkaðu flestu føroysku sluppirnar sum farmaskip. Tær fluttu fisk úr Íslandi til Stórabretlands, har



*Jóhanna TG 326. Mynd: Ingi Sørensen*

tørvurin var stórur á fiski til matna. Hetta var sera vandamikil sigling, mangt føroyskt skip gekk burtur hesi árini, orsakað av álopum frá týskum kavbátum og flogførum, ella tí at tey sigldu á eina minu. Í mun til fólkatalið, mistu føroyingar næstan líka nógvar menn í bestu árum, sum krígsførandi londini. Eftir annan heimsbardaga fór tíðin frá sluppunum. So hvørt sum tær vórðu tiknar úr vinnu, vórðu flestu sluppirnar søktar – og í dag eru bert nakrar heilt fáar eftir. Tvær av teimum eru myndevnið á hesum frímerkinum, Johanna TG 326 framman og Westward Ho TN 54 í baksýni. Báðar sluppirnar eru 135 ára gamlar í ár.

**Johanna – TG 326**

Sluppin Johanna varð bygd í 1884 á Collin Hoads skipasmiðjuni í Rye, Sussex, fyri John William Haylock í Surrey. Skipið kallaðist upprunaliga Oxfordshire. Í 1894 varð Oxfordshire seld til reiðaran George Edward James Moody í Grimsby, men longu sama ár seldi hann skipið víðari til føroyska vinnulívsmannin Jákup Dahl í Vági. Sluppin fekk navnið Jóhanna, og var fyrsta skip, ið Dahl átti. Hann víðkaði so við og við fiskiflotan og hevði at enda 20 sluppir og skonnartir – og A/S J. Dahl gjørdist ein av stóru føroysku fyritøkunum innan handil, skipsrakstur og fiskavirking. Undir øðrum heimsbardaga sigldi Johanna við fiski úr Íslandi til Stórabretlands, men slapp snikkaleys frá krígnum. Hon virkaði sum fiskiskip, til hon varð løgd í 1972. Jóhanna lá við kei í Vági til 1980, tá avgerð varð tikin um at søkkja hana. Men í síðstu løtu varð hon bjargað av einum áhugabólki, ið keypti hana fyri eina krónu – tók hana upp á turt og setti hana í sama stand, sum tá hon á sinni kom til landið. Bróðurparturin av arbeiðinum varð framt av sjálvbodnum vágbingum. Í dag er Johanna av røttum stoltleikin hjá Vágs bygd og verður nýtt til sigling kring oyggjarnar og til grannalondini – umframt í ferðavinnuni.




**Westward Ho – TN 54**

Westward Ho varð bygd av Leaver & Co. í Grimsby í 1884, sama ár sum Jóhanna. Í 1895 varð hon keypt til Føroya av Hans Georg Thomsen frá handils- og reiðarífyritøkuni T. F. Thomsen á Tvøroyri. T. F. Thomsen hevði, tá einahandilin varð avtikin, bygt sína fyritøku á Tvøroyri og hevði uml. 20 sluppir, skonnartir og minni jaktir í flotanum. Heimkomin til Føroya, var sluppin nýnevnd "Viking" - men í 1908 fekk hon sítt upprunaliga navn aftur.  Sum sluppir flest var Westward Ho upprunaliga deyðssiglari. Men í 1925 fekk hon motor ísettan og stýrihús. Sum fiskifar fór Westward Ho víða um, hon fiskaði undir Føroyum, undir Íslandi, Rock All, Grønlandi og Bjarnoynni. Westward Ho sigldi eisini við fiski úr Íslandi til Stórabretlands undir krígnum – og slapp óskalað frá vandasiglingini.

Seinastu tíðina sum fiskiskip, fiskaði Westward Ho við línu undir Føroyum um várið og við sildagørnum um heystið. Sluppin hevur altíð havt ein serligan týdning fyri undirritaða, tí at pápi mín førdi Westward Ho seinast í fimtiárunum.

Í 1964 fór Westward Ho úr fiskiflotanum. Hon varð tikin upp á beding á Tvøroyri og sett í sín upprunaliga stand. Í 1967 keypti áhugabólkurin "Sluppgrunnurin" sluppina til Havnar,  og hon varð skrásett til TN 54. Hon virkaði í nøkur ár og varð røkt av sjálvboðnum. Men so við og við fullu eldsálirnar frá og skipið lá nøkur ár í órøkt við kei.

At enda yvirtók Tórshavnar kommuna skipið og sendi tað til Fraiserburgh í Skotlandi til umfatandi umvæling og útskifting av motorinum. Í 2005 kom Westward Ho aftur til Havnar og hevur síðan virkað sum umboðsskip fyri býin. Vakra seglskipið verður nú brúkt til sigling millum oyggjarnar, til frálæru av skúlabørnum - og verður annars leigað út við skipara og manning.

*Anker Eli Petersen*










# Messuaklar

**Føroyskir messuaklar á frímerkjum**

Posta fer við trimum frímerkjaútgávum at seta sjóneykuna á messuklæði í føroysku fólkakirkjuni. Myndevnini fevna um litirnar í kirkjuárinum og breiddina í fjølbroytta handarbeiðinum, sum eru í kirkjunum um alt landið.

Tey fyrstu frímerkini verða givin út tann 23. september 2019, og tey vísa ávikavist ein reyðan messuakul úr Sandvíkar kirkju (vígd 1908) og ein grønan messuakul úr Funnings kirkju (vígd 1847).

Reyði messuakulin er úr floyalstilfari og prýddur við einum borda og krossi aftan. Grøni messuakulin er úr norskari ull og bummull. Messuakulin er handvovin. Íblásturin til messuakulin er úr sálminum: „Eg skar mítt navn í grein ta hvítu." Jóannes Patursson yrkti í 1901. Messuakulin er ein gáva frá familjuni hjá Knúti Højsted. Kirkjan fekk hann í 1990. Karin Brattaberg hevur sniðgivið og gjørt hann. Stola hoyrir til.

**Messuaklar**

Eftir trúbótina helt lutherska kirkjan fram við at nýta messuklæði, ið var gamal siður frá katólskari tíð. Í 18. og 19. øld varð nógv tosað um, hvussu messuaklarnir skuldu síggja út. Sniðið og støddin á messuaklum hevur verið eitt sindur ymisk, og er tað sama galdandi enn í dag. Neyðugt er at hava í huga, tá ið kirkja skal hava nýggjan messuakul, hvørt messuakulin skal passa fleiri prestum ella tí presti, ið er í starvi júst tá.

Messuaklarnir verða vanliga brúktir, tá ið altargangur er, og um barnadópur er sama dag, eru tað summir prestar, sum eisini eru í messuaklinum undir barnadópinum. Annars er tað eitt sindur ymiskt, hvussu nógv messuakulin verður brúktur. Í kirkjum, sum hava messuaklar í teimum fýra liturgisku litunum, nýta summir prestar messuakul í gudstænastupartinum fyri prædiku, men fara úr messuaklinum, áðrenn teir fara á prædikastólin, meðan aðrir prestar eru í messuaklinum undir allari gudstænastuni.



*Funnings kirkja. Mynd: Shutterstock*

**Litir í kirkjuárinum**

Messuaklar og stola fylgja litunum, sum ásettir eru sunnu- og halgidagar í kirkjuárinum, eisini nevndir liturgisku litirnir. Tað eru tó nógvar kirkjur, sum ikki eiga kirkjuklæði í øllum litunum. Liturgisku litirnir eru hvítt, reytt, viólblátt, grønt og svart. Litirnir fylgja kirkjuárinum og knýta seg at kirkjuligu hátíðunum og halgidøgunum. Litirnir ímynda hesi viðurskifti:

- Hvíti liturin ímyndar ljós og reinleika, gleði og hátíð, heilagleika og sakloysi og er hátíðarlitur kirkjunnar. Hvíti liturin verður nýttur jólaaftan, jóladag, sunnudag millum jóla og nýggjárs, nýggjársdag, sunnudag eftir nýggjár, trettanda dag, 6. s. e. trettanda, boðanardag Mariu, skírhósdag, páskadag og 2. páskadag, 1.-6. sunnudag eftir páskir, Kristi himmalsferðardag, tríeindardag, allahalganna sunnudag og 27. s. e. tríeindardag.
- Reyði liturin ímyndar blóð og kærleika, eld og heilaga andan. Reyði liturin verður nýttur 2. jóladag, hvítusunnudag og 2. hvítusunnudag.
- Viólblái liturin ímyndar iðran og umvending, umhugsni og føstu. Hann verður nýttur í adventini, 1.-4. sunnudag í advent, septuagesima, sexagesima, sunnudag í føstuinngangi, í føstuni, 1.-3. sunnudag í føstu og miðføstusunnudag, pálmasunnudag og dýra biðidag.
- Grøni liturin ímyndar vøkstur og lívsmegi, búning og vón. Grøni liturin verður nýttur størstan part av kirkjuárinum, 1.-5. sunnudag eftir trettanda, 1.-26. sunnudag eftir tríeindardag.
- Svarti liturin ímyndar sorg og deyða, dapurleika og myrkur, og verður bara nýttur langafríggjadag.

Síðan 1982 hevur Paulina M. K. Eliasen skrásett øll kirkjuklæði í føroysku kirkjunum, bønhúsum og í teimum skúlum, sum verða brúktir til kirkjugongd. Hyggja vit ígjøgnum skrásetingarnar, síggja vit, at í Føroyum eins og í Danmark, hevur tann reyði stutti messuakulin



*Messuakulin í Funnings kirkju. Mynd Ingi Joensen*

úr floyali og við gyltum krossi aftan og einum ella tveimum gyltum bordum runt um kantin verið so at siga í øllum kirkjum. Teir elstu messuaklarnir, sum eru í kirkjunum, eru frá 1890-árunum og frá umleið ár 1900 og frameftir. Nakrir teirra eru í nýtslu enn, og nógvastaðni vita tey ikki, hvussu gamlir teir eru. Tað er Dansk Paramenthandel, stovnaður í 1895, sum hevur gjørt nógvar messuaklar til føroysku kirkjurnar. Skrásetingin vísir ongar broytingar í messuaklum fyrr enn í seinnu helvt av 20. øld. Christianskirkjan, sum er vígd í 1963, fær í 1970-árunum ein grønan messuakul úr brokadetilfari, og er tað Dansk Paramenthandel, sum hevur gjørt hann. Vesturkirkjan, sum er vígd í 1975, fær messuaklar í øllum fýra litunum í kirkjuárinum. Tann grøni og tann reyði eru gjørdir í Danmark. Tann hvíti og viólblái eru gjørdir í Onglandi.

Seinastu árini eru nógvir messuaklar gjørdir í Føroyum. Teir eru rættiliga ymiskir við atliti at sniði, klæði og seyming. Tað verða tó framvegis keyptir nógvir messuaklar uttanlands, serliga úr Belgia og Danmark. Í tilfarinum sæst, at tað sum heild er broyting í kirkjuklæðunum bæði við atliti at liti og sniði, og at nógvar kirkjur í dag hava meir enn ein messuakul, og flestu kirkjur hava fleiri altardúkar. Eisini hava nakrar kirkjur messuaklar í øllum fýra litunum í kirkjuárinum. Tað er tó ymiskt frá staði til stað. Onkrar kirkjur hava eingi nýggj kirkjuklæði fingið í hesum tíðarskeiði, meðan aðrar hava fingið fleiri nýggj klæði, m.a. hevur ein kirkja fingið tríggjar nýggjar altardúkar hesi árini. Onkur kirkja átti bara ein altardúk og eigur framvegis bara henda altardúkin. Tað er sera ymiskt, hvussu raðfest verður listarliga, um kirkjuklæði verða keypt frá útlendskum fyritøkum ella frá føroyskum listafólki. Tað eru serliga messuskjúrtur og messuaklar, sum verða keypt uttanlands, meðan tað í flestum førum eru føroyskar kvinnur, sum hava gjørt altardúkarnar, og sama er galdandi fyri gólvleyparar, sum nógvir eru vovnir í Føroyum.

*Heimild: Bókin "Kirkjuklæði" eftir Paulinu M. K. Eliasen, sum kemur út í heyst.*

# Nýggjar útgávur 3. juni, 11. juni og 23. september




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Fyri faðirleys** |
| Útgávudagur: | 03.06.2019 |
| Virði: | 11,00 og 35,00 kr. |
| Nummar: | FO 914 - 915 |
| Stødd, frímerki: | 22,5 x 30 mm |
| Stødd, smáark: | 105 x 70 mm |
| Listafólk: | Janus Kamban / Kári við Rættará |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv 0-50 g, og brævpakkar innanoyggja 0-500 g. |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Postgjaldsmerki Wuhan: Grísahald** |
| Útgávudagur: | 11.06.2019 |
| Virði: | 4 x 11,00 kr. |
| Stødd, frímerki: | 56,0 x 25,0 mm |
| Listafólk: | Martin Mörck og Wang Lei |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Walsall Security Printers, Stórabretland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja, 0-50 gr. |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Elinborg Lützen 100 ár** |
| Útgávudagur: | 23.09.2019 |
| Virði: | 55,00 kr. |
| Nummar: | FO 916 |
| Stødd, frímerki: | 40 x 30 mm |
| Listafólk: | Hans Pauli Olsen |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | La Poste, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Brævpakkar innanoyggja, 500-1000 gr. |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Jóhanna TG326 og Westward Ho** |
| Útgávudagur: | 23.09.2019 |
| Virði: | 11,00 kr. |
| Nummar: | FO 917 |
| Stødd, frímerki: | 56 x 21 mm |
| Listafólk: | Kári við Rættará |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja, 0-50 gr. |




Royndarprent

+ sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Messuaklar** |
| Útgávudagur: | 23.09.2019 |
| Virði: | 11,00 og 19,00 kr. |
| Nummar: | FO 918-919 |
| Stødd, frímerki: | |
| Listafólk: | |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja og til Evropa 0-50 gr. |

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Westward Ho TN 54. Myndatøka: Faroephoto . Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark.

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

ISSN 1603-0036

/faroestamps